UTTAN ÚR HEIMI

## Aftur at lossa

Lossingarmenninir í amerikansku kyrrahavshavnunum fara aftur til arbeiðis fyrsta dagin eftir at hava verið í verkfalli í longri tíð.

Lossingarmenninir góðtóku mánadagin eitt semingsuppskot, sum tryggjar teimum betri eftirløn, men samstundis noyddust teir at góðtaka, at havnirnar fara at nýta ymisk nútímans lossiamboð, sum gera, at tað verður ikki brúk fyri so nógvum lossingarmonnum sum fyrr.

Verkfallið hjá lossingarmonnunum hevur kostað amerikanska samfelagnum umleið eina milliard dollarar um dagin, og fleiri reiðaríir hava mist nógvan pening. Umleið 100 stór farmaskip hava ligið við bryggju við farmi og bíðað. Teirra millum vóru fleiri bingjuskip hjá Maersk Sealand, sum danska A.P. Møller eigur.

## Belo fer frá

Biskuppurin í Eystur Timor, Carlos Ximenes Belo, sum fekk friðarheiðursløn Nobels í 1996, hevur biðið Jóhannes Páll páva loysa seg úr embætinum.

Úr Eystur Timor verður sagt, at heilsan er farin at svíkja hjá tí 54 ára gamla biskuppinum, og vælvitandi keldur í Vatikaninum søgdu í gjár, at pávin hevur longu játtað umbøn hansara.

Carlos Ximenes Belo fekk Nobel-friðarheiðurslønina saman við Jose Ramos-Horta í 1996 fyri arbeiðið, sum teir báðir høvdu gjørt fyri at fáa ein friðarligan enda á indonesisku hersetingini. Hann var eisini ein av høvuðsmonnunum í friðarsamráðingunum, sum ST stóð á odda fyri fyri trimum árum síðani. Belo, sum er føddur í 1948, gjørdist biskuppur í 1988.

## Ísrael fær rakettir

Ísrael hevur biðið Týskland selja sær rakettir av slagnum Patriot, og fyrradagin segði Gerhard Schrøder, kanslari, at Ísrael fær rakettirnar. Schrøder segði tað vera eina treyt, at rakettirnar bert verða nýttar til verjuendamál.

Í Týsklandi verður hildið, at ísraelski herurin hevur bílagt rakettirnar til verju ímóti møguligum irakskum álopum. Tá Irak varð rikið úr Kuwait, skutu irakar fleiri Scud-rakettir eftir Ísrael, og vandi er fyri, at tað sama kann henda, leypa amerikanarar á Irak aftur nú.

Týskland hevur fleiri ferðir boðað frá, at landið fer ikki at taka lut í einum álopi á Irak, men Gerhard Schrøder, kanslari hevur hinvegin sagt, at Týskland hevur eina søguliga skyldu at hjálpa Ísrael at verja seg ímóti álopum.

## Lívverji skotin

Ein av lívverjunum hjá fyrrverandi jugoslaviska forsetanum, Slobodan Milosevic, varð myrdur í Beograd týskvøldið.

Lívverjin sat í einum bili saman við einum øðrum manni, tá onkur loysti fleiri skot av eftir bilinum. Báðor menninir doyðu, men løgreglan veit ikki, hvør ella hvørjir drápsmenninir vóru.

Lívverjin, Nenad Batocanin, var lívverji hjá Milosevic, til hesin varð koyrdur frá í oktober í 2000. Seinni gjørdist hann ovasti fyri lívverjuni hjá Zoran Zizic, forsætisráðharra, og tað starvið hevði hann til á sumri í fjør, tá Milosevic varð tikin og fluttur til krígsbrotsmannadómstólin í Haag. Áðrenn hann gjørdist lívverji hjá Milosevic, hevði Batocanin eitt leiðandi starv í løgregluni.

# Nú leita teir eftir vápnum

**Vápnaeftirlitsmennin ir hjá ST fóru í gjár undir at kanna, um Irak hevur hópoyðingarvápn**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*

Nú fæst at vita, um Irak hevur hópoyðingarvápn. USA sigur jú, Irak nei, og nú skulu eftirlitsmenninir hjá ST so kanna, hvør sigur satt.

Tíðliga gjáramorgunin fór tað fyrsta bilafylgið við eftirlitsmonnunum úr Bagdad saman við irakskum embætismonnum og einum hala av útlendskum tíðindafólki, sum ætla sær at fylgja við arbeiðinum hjá eftirlitsmonnunum.

Í hesum fyrsta eftirlitsbólkinum eru 17 mans, ellivu vápnaeftirlitsmenn hjá ST og seks serfrøðingar hjá altjóða kjarnorkustovninum IAEA, men um nakrar dagar koma umleið 100 mans afturat. Teirra millum eru vápnaserfrøðingar, verkfrøðingar og fólk, sum hava útbúgving innan lívfrøði og evnafrøði.

Í gjár fóru eftirlitsmenninir fyrst at kanna eina støð einar 20 kilometrar uttan fyri Bagdad. Har vóru vápnaeftirlitsmenn eisini, áðrenn teir vórðu riknir úr Irak. Tá komu teir fram á ólóglig vápn har. Spurningurin er so, hvat eftirlitsmenninir finna hesaferð - ikki bert har, men í Irak.

# Betri eftirlit við tangaskipum



*Hundraðtals bjargingarmenn og sjálvboðin taka olju upp í sponsku fjøruni, og nú er nóg mikið við hesum óskilinum, siga Spania og Frakland, sum fara at kanna tangaskipini*

*Mynd: Reuters*

**Spania og Frakland fara nú at skipa reglur um oljuflutning nærhendis landi**

OLJUFLUTNINGUR
*Árni Joensen*

- Vit hava tikið avgerðina, tí nú er nóg mikið, segði franski forsetin, Jacques Chirac, á einum tíðindafundi í spanska býnum Malaga, har hann hevði tosað við spanska forsætisráðharran, Jose Maria Aznar, um dálkingina frá tangaskipinum "Prestige", sum sakk úti fyri sponsku útnyrðingsstrondini.

Bæði Frakland og Spania hava fyrr kent sviðan av tangaskipum, sum eru farin at leka, ella sum eru farin á land, og spanska stjórnin kunngjørdi fyrradagin, at í framtíðini verða tangaskip kannað, eru tey minni enn 32 fjórðingar úr sponsku strondini. Skipanin kom í gildi longu í gjár, og hon umfatar skip, sum eru eldri enn 15 ár, og sum hava einkultan skrokk. Skipini skulu upplýsa, hvønn farm tey hava, hvaðani tey koma og hvagar tey skulu, hvørjum flaggi tey sigla undir, og hvat útgerðarfelag tey hava. Skip, sum verða hildin at vera ov vandamikil, fáa boð um at halda seg longur úr landi.

Fronsku myndugleikarnir hava tikið undir við sponsku avgerðini, og hon fer tí eisini at galda tangaskip, sum koma í franskan sjógv. Vanligt er, at ES-londini hava felags reglur á slíkum økjum, men myndugleikarnir í Madrid og París hava boðað frá, at teir hava ikki stundir at bíða eftir einari møguligari avgerð í Bruxelles.

# Ísrael kann vænta sær ógvuslig hevndarálop

**Víðgongda palestinska rørslan Fatah hóttir Ísrael við ógvusligum hevndarálopum, eftir at ein ísraelsk rakett drap tveir hernaðarligar leiðarar á Vestara Áarbakka týsdagin**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Teir báðir hernaðarligu leiðararnir doyðu, tá ísraelsmenn skutu eina rakett eftir einum húsum í flóttafólkaleguni Jenin á Vestara Áarbakka. Annar maðurin var leiðari í einari deild á Al-Aqsa-brigadunum, og hin var deildarleiðari hjá felagsskapinum Hamaz.

Ein talsmaður hjá Fatah segði við fronsku tíðindastovuna í gjár, at ísraelska álopið hevði eina miðvísa ætlan, og at talan var um eina beinleiðis avrætting. Talsmaðurin segði, at álopið forðar fyri, at palestinar kunnu gevast við sjálvmorðsbumbuatsóknunum at málum í Ísrael.

- Vit fara at svara harðliga aftur. Ísraelsmenn tóku okkum á bóli hesaferð, og vit fara at taka teir á bóli, segði talsmaðurin.

Fyrrapartin í gjár søktu ísraelskar tyrlur at málum í býnum Khan Yunis í Gazageiranum. Tyrlurnar skutu fimm rakettir, sum sambært palestinskum talsmonnum oyðiløgdu ein skúla og tvey onnur hús. Einki fólk fekk skaða.



# Føroyska ullin hevur lív lagað




*Hjúnini Brattaberg í ferð við enn eitt marknaðartiltak til frama fyri brúki av føroyskari ull. Her á sølustevnu í høllini á Nabb*

*Mynd: Jan Müller*

**Í morgin, fríggjadagin 29. november, eru 5 ár liðin síðani spunalagið á Suðuroyar Ullvirki var tikið í nýtslu, og harvið býðst høvi til at hugleiða um føroysku ullina, ullaframleiðslu o.s.fr**

ULL
*Tíðindaskriv*

Í mong harrans ár var orðaskifti millum manna og mynduleikar um trupulleikarnar, sum vóru tengdir at føroysku ullini. Samlaða árliga nøgdin, umleið 50 tons var nevnd sum ein umhvørvistrupulleiki, og bert heilt smáar nøgdir av ull vóru innsavnaðar og gagnnýttar í Føroyum. Ongin ítøkilig ætlan var um at taka avbjóðingina at gagnnýta hetta einaferð so dýrmæta tilfeingi til fulnar.

Sagt varð at føroyska ullin kundi ikki brúkast, hon var keðiliga litt og hon skriðaði, um hon ikki varð nappað, hetta, hóast flestu føroyingar vita, at ullin fyrr var ein treyt fyri at kunna búleikast her.

So varð, stig tikið til at stovnað eitt felag har seyðaeigaranir í øllum landinum áttu lut.

L/F Suðuroyar Ullvirki varð stovnad tann 29. november 1995 og endamálsgreinirnar eru:

- At takað ímóti og viðgera ull
- At leiðbeina hvussu ullin skal handfarast, tá ið roytt verður
- At skipa fyri seyðasýningum og aliarbeiði í sambandi við ull og kjøt
- At góðska ullina til tógv og vørur fyri at fáa best møguliga úrtøku
- At røkja áhugamál limanna fyri best møguligum seyðahaldi

Karðiverk og spunalag, sum var vælegnað at tilvirka føroyska ull á var keypt úr Haderslev í Danmark. Spunalagi var tikið í nýtslu 29. november 1997. Fyrsta ullin var savnað inn runt landið á sumri 1998 og tey seinastu 5 árini hevur Suðuroyar Ullvirkið tikið ímótið 135 tonsum av ull. Av hesum eru umleið 30 tons gagnnýtt sum vørur seldar frá Ullvirkinum. Til stuttleika kann nevnast, at um hetta verður umroknað til eintátta tógv er talan um 150 millión metur tráð ella tilsvarandi longd á einum tráði sum røkkur 4 ferðina runt knøttin.

SIRRI varð stovnað í februar 2000, endamálið var at reka handil við ullvørum tilvirka úr reinari føroyskari ull. Nú gott 2 ár seinri hevur SIRRI handil í Vági, á Áarvegnum í Havn og í Runavík. SIRRI klæði verða eisini seld hjá Vimu í Klakksvík, í Prýðinum á flogvøllinum, í Stikkuni á Eiði og á Heimavirkinum í Vági. Harafturat verða SIRRI klæði seld í Keypmannahavn, Stavanger og Skien í Norra, umframt at fólk úr øllum heraðshornum í heiminum keypa av heimasíðuni www.sirri.fo

SIRRI hevur lagt seg eftir at sniðgeva til børn í øllum aldri, ung og eldri. Í byrjanini fingust bert hosur og føroyskar troyggjur til keyps, nú er samlaða vøruúrvali stórt - 50 ymiskar vørur býtt millum karðaða ull, tógv, pløgg frá innast til uttast til gerandis og fínt og okkurt til húsbúnað.

Í løtuni arbeiða 10 fólk hjá Suðuroyar Ullvirki og SIRRI, harafturat eru tíðugt lesandi innan klædnaídna í praktikk. Næmingarnir koma úr øllum norðurlondum, t.d hava fleiri føroyingar verið, sum nema sær útbúgving í Danmark.

SIRRI vørur eru sermerktar, slitsterkar og spennandi!. Sermerkini eru m.a. tað tøvda tilfari, brúk av hornknøppum og brúki av vovnum og bundnum tilfari saman. Møguleikarnir við føroysku ullini vísa seg at verða óavmarkaðir bæði hvat snið og brúki viðvíkur. Tað eru nógvir fyrimunir at brúka reina føroyska ull; t.d. hava náttúrulitirnir eitt framúrskarandi litspæl - litað ull virkar, í mun til hana, lívleys. Eftirsum ullin er samfingin er hon ógvuliga slitsterk og harðført, so pløggini tola nógv av.

Tíverri er tað framvegis ikki fingin í lag ein ullinnheintingar- og flokkingarskipan í Føroyum. Hetta er ógvuliga umráðandi, skal dygdin á føroysku ullvørunum gerast uppaftur betur. Suðuroyar Ullvirki hevur sent Vinnumálastýrinum uppskot um eina slíka skipan og vit meta at skipanin má fevna um serliga hesi evni:

- Kunning og vegleiðing um handfaring av ull
- Innheinting og flokkingarskipan fyri ullina
- Vasking av ullini
- Víðari tilvirkan av ullini til pløgg.

Suðuroyar Ullvirki metir at tað er umráðandi og rætt at øll liðini í ullahandfaringini frá rættini til plagg verður gjørt í Føroyum. Altjóða ráki vísir at tað er eftirspurningur eftir sermerktum vørum framleiddar burðardygt (mótvegis vørum framleiddar av ull vaska t.d. í Onglandi, spunnið í Latín Amerika, bundið í Litavia og síðani selt í einum fjórða landi).

Gott hevði verðið um ull kom á dagskránna hjá teimum hon er viðkomandi fyri; mynduleikunum, bóndrum og almenninginum saman við ullavirkjunum.

Suðuroyar Ullvirki og SIRRI meta at framtíðarvánirnar fyri fyritøkurnar og føroysku ullina eru góðar. Viðskiftafólk eru væl nøgd við vørurnar og halda tær verða haldbarar. Eftirspurningurin eftir SIRRI vørum er stórur og bara økjandi, nýggj snið verða væl móttikin. Maskinvevir eru keyptir og verða settir í gongd til várs.

Ætlanin er framvegis at økja um vøruúrvalið og brúksøki, t.d. gleða vit okkum til at gera heimsins sterkastu gólvteppi burtur úr samfingnari ull við nógvum broddi.

Samanumtikið kann sigast, at okkara royndir eru, at fólk hesi seinastu 5 árini hava tikið ta føroysku ullina til sín aftur - hava gjørt seg til eitt við serligu dygdina í reinari føroyskari ull. Endiliga hava pløgg úr føroyskari ull í náttúrulitum aftur fingið heiðurpláss - at verða brúkt til gerandis og fint. Útlendingar hava sagt seg imponerað av, at føroyingar hava kláráð at gera klæði við sermerkta sniðinum og úr náttúrulitunum hetta er, t.d. ikki sligið ígjøgnum í grannalondunum t.d Íslandi, Noregi, Shetlandi ella Írlandi.

Suðuroyar Ullvirki er einasta virki í landinum, sum er grundað á framleiðslu av vørum úr føroyskari ull, og er eisini einasta virki i landinum, sum bara fæst við at spinna føroyska ull - so einfalt er tað!.

Í sambandi við 5 ára dagin verður latið 10 % avsláttur av SIRRI vørum í handlunum sum selja SIRRI vørur.

Komandi leygardag tann 30. november er virkið opið fyri almenninginum millum kl. 14 - 17.

Seyðahár
í 1000 ár
átti lívið
í okkum

Ein vælbundin troyggja
úr føroyskari ull
Er eins og brynja
ið verjir fyri øllum veðri
lat teg úr troyggjuni
rist hana einar tvær ferðir
og regndroparnir flúgva burtur

Vælbundnar hosur
eru altíð heitar
Verða tær vátar
hitna tær aftur

Var tú kaldur um
høvur og fót
beyð tær ikki bót

Frá innast til uttast
frá høvur til fót
Hin vælsignaða ullin
eisini til segl og nót

Við hógv
verður ull
til víkingatógv

**Steinbjørn B. Jacobsen**